# SANDOYAR MEGINSKÚLI

210 Sandur · Tlf. 361038 · fax 361866
t-postur: samesk@post.olivant.fo

## Fyribils starv sum varaskúlastjóri

Vegna farloyvi verður starvið sum varaskúlastjóri á Sandoyar Meginskúla lýst leyst. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. august 2008 til 31. juli 2009.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsføðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans

**Harumframt skal varastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyristingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd

**Lønar- og setanartreytir**
Umsøkjarin skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Starvið verður lønt í lønarflokki 32.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga tímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum verða sendar skúlanum.

Freistin at søkja er 6.mai 2008.

Nærri fæst at vita um starvið frá Elnu Skylv Hansen, skúlastjóra, á tlf 361038 & 216038.

**Sandoyar Meginskúli** hevur komandi skúlaár uml.105 næmingar í 6.-10.fl og um 12 lærarar.

# Skopunar Kommuna



## Námsfrøðingar

### til Barnagarðin í Gerðinum, Skopun

Søkt verður eftir 3 námsfrøðingum til Barnagarðin í Gerðinum at byrja 1/7-08.

**Søkt verður eftir:**
- 1 námsfrøðingi 37 t/v til Pinkustovuna, har aldursbýtið er 0-3 ár.
- 1 námsfrøðingi 37 t/v til Miðstovuna, har aldursbýtið er 3-5 ár.
- 1 námsfrøðingi 37 t/v til Skúlastovuna, har aldursbýtið er 5-7 ár.

**Um okkum:**
Barnagarðurin í Gerðinum læt upp 1. desember 2006.

Á stovninum eru uml. 50 børn og 14 starvsfólk, harav 5 námsfrøðingar og 9 hjálparfólk.

Stovnurin hevur barnagarðs-, vøggustovu og frítíðarskúla við børnum frá 1., 2. og 3. flokki.

**Vit bjóða:**
Eitt áhugavert starv í einum umhvørvi tætt at náttúruni, frítíðarøki og fótbóltsvølli.

Ein avbjóðandi gerandisdag, har stórur dentur verður lagdur á námsfrøðiliga arbeiði og við møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Vit vænta:**
At tú hevur umsorgan og virðing fyri børnunum. Hevur áhuga fyri barnavirksemi bæði innandura og uttandura. Hevur góð samstarvsevnir og er fyrikomandi.

**Setanarviðurskifti:**
Løn og setanarviðurskifti eru skipað sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Fríðu Eystberg Johannesen, leiðara tlf. 361202 ella fartlf. 216202.

Skrivlig umsókn við prógvi og viðmælum, skal sendast til:

**Skopunar Kommuna**
**Att: Fríða Eystberg Johannesen, leiðari**
**FO-240 Skopun**

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26.05.2008

Setanarsamrøður verða í viku 23.

# VENJINGARSKÚLIN

handan Á 14 · Box 59 · FO-110 Tórshavn

## Fyribilsstarv sum varaskúlastjóri

Í sambandi við, at varaskúlastjórin fer í farloyvi, verður starvið sum varaskúlastjóri í Venjingarskúlanum lýst leyst til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2008 til 31. juli 2009.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni í skúlanum
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava læraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribilstænastu í Venjingarskúlanum. Tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokki 34.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, sum sett/-ur verður, er tænastumaður frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir** við ljósriti av prógvum og CV og møguligum viðmælum skulu verða sendar skúlanum.

Freistin at søkja er **28. apríl 2008 á middegi**.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petur Ova Petersen, skúlastjóra á telefon 213502 ella 301529.

Í Venjingarskúlanum verða komandi skúlaár umleið 440 næmingar í 19 flokkum, og her koma at starvast 45 fólk. Lærararnir eru skipaðir í 5 sjálvstýrandi toymi: 1.-3. fl., 4. og 5. fl., 6. og 7. fl., 8.-10. fl. og sertoymi. Skúlin húsast í trimum bygningum: 1. og 2. flokkur halda til á Ytra skúla við Landavegin, 3. fl. á Heimara skúla við Fr. Petersens gøtu og 4.-10. fl. eru í skúlanum á Stórheyggi.


# HALT FERIU Í SKARRILD




(+45) 236.781.66 ella (+45) 236.781.65
www.hammershus.fo - torfinnur@email.fo


# MASKINFØRARI

**Søkt verður eftir maskinførara at koyra eina 30 t beltimaskinu.**

**Arbeiðsplássið er í Tórshavn.**

P/F J & K Petersen · Á Hjalla · FO-188 Hoyvík
Tlf 315060 / 585014 · jkp@jkp.fo